# ma í Kunoy

*Hevði ætlanin um at gera fótbóltsvøll í Kunoy verið gjørd til veruleika, hevði vøllurin ligið sum á hesi tilgjørdu myndini*



(Beinleiðis úr gerðabókini)

## Lóv fyri Kunoyar Ítróttarelag

5. februar 1923
Navn felagsins er Kunoyar ítróttarfelag og yrki felagsins er, at fáa samla fólk til at mennast í ídrottum, sum fótbólt og hondbólt, krokspæl og anna – svimjing og kappróður.

§ 2
Limur kann ein og hvør gerast, sum er 14 ára gamalur.

§ 3
Limagjaldið verður ásett fyri eitt ár ísenn av stjørn felagsins.

§ 4
At fara úr felagnum má skriftligt leggjast fram fyri stjørn felagsins.

§ 5
Tann sum slettar seg úr felagnum, eigur einkið krav til felagsins rættindir og ognir.

§ 6
Stjørn felagsins velist fyri eitt ár – hvør limur er sjildigur at móttakað valg.

§ 7
Bestýrilsi bestendur av 3 limum og tveir tiltaksmenn.

§ 8
Uppskot til lovbroytingar verða framlagt á aðalfundi. Splittast felagið og nøkur ogn verður, skal hon falla til Kunoyar kommunalkassa

Í fundarbókini fyri tann dagin stendur (beinleiðis endurgivið): "Kunoyar Itróttarfelag helt fund 5/2 –1923 í samkomuhúsinum og vitikið var at fáa eitt ploss til fótbóltsplen, sum játta bleiv av ognarunum. Innskodi bleiv ásett at verða 3 krónur pá hvønn lim, og tjúðu tímar pligtarbeiði ið uppfylgt skuldi verða innan oktobermanans útgang, ella útroyast við 55 oyru fyri hvønn tíma. Valg av fyristøðumonnum – valdir blivu Dánjal J. Pállsson, Páll M. Jógvanson og Niels P. Mikkelsen". (Sitat slutt).

Í ymiskum kladdubókum hjá felagnum, sum vit hava fingið innlit í, sæst at fundir eru av og á, men í flestu førum er fótbóltsvøllurin til viðgerðar, í 1930, 1935 og 1938 eru nakrir fundir, men lítið sæst til nakað felagsarbeiði, annað enn at okkurt eydnuhjól ella lutaseðlasøla skal fyriskipast.

Í limalistanum hjá KÌ, sum er tøkur aftur til 1939, sæst, at tað eru næstan bara kunoyingar á listanum, men limalistin víslr eisini, at klaksvíkingar flýggja til Kunoyar undir krígnum, tí í 1942 koma nøvn á klaksvíkingum eisini á listan.

Felagið í Kunoy sovnaði spakuliga burtur, men áðrenn tað, hava teir so fingið ognað sær tað 4528 fermetrar stóra stykkið, sum liggur oman fyri bygdina.

Ikki fyrrenn í 60-unum og eisini í 70-unum fóru menn aftur at hugsa um at fáa lív aftur í felagið, men tær royndirnar eydnaðust ikki, og onkur roynd er gjørd síðan.

Vit kunnu bert staðfesta, at felagið helst er stovnað í 1923 og eigur eina sparikassabók, gerðabók, nakrar kladdubøkur og ein fótbóltsvøll oman fyri bygdina.

Um onkur av lesarum okkara veit meira um felagið, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við okkum á Sosialinum.